Beinir Johannesen
Árni Skaale
Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
Bárður á Lakjuni
løgtingsfólk

Broytingaruppskot V

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 13, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 2.* Gistingarhús og privat, sum veita gisting móti gjaldi, t.d. við Ból og bita, skulu leggja gistingargjaldið afturat kostnaðinum fyri gisting, og tann, sum leigar út um netborin sølutorg, skal leggja gistingargjaldið afturat leiguni."

2. § 13, stk. 3 verður strikað.
   § 13, stk. 4 verður eftir hetta stk. 3.

3. Í § 13, stk. 4, sum verður stk. 3, verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 3.* Gjaldið, nevnt í stk. 2, verður goldið landinum á sama hátt sum ferðagjaldið, sbr. § 1, stk. 3, í løgtingslóg um ferðagjald."

Viðmerkingar
At leggja gistingargjald á stuttleikabátar og húsvognar tykist órímiligt. Um ferðandi koma til landi við egnum báti ella húsvogni, tykist tað løgið at krevja gjald frá teimum fyri at sova í egnari song í báti ella húsvogni.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1 og 2
Sambært broytingini verður gjald bert tikið fyri gisting á hotelli og privatari útleigan, ikki frá campingplássum, tjaldingarplássum, seglbátum o.tíl.

Ad. 3.
Teknisk konsekvensbroyting.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen Jacob Vestergaard Bárður á Lakjuni

Árni Skaale Beinir Johannesen